Netmiðlan™

## Lønarseðlar á Netmiðluni

Í hesum døgum fáa persónar, sum fáa løn ella aðrar ávísar samsýningar frá tí almenna, eitt bræv frá Netmiðluni. Netmiðlan er talgild postskipan, sum altíð slepst til umvegis alnetið. Í brævinum eru upplýsingar um nýtslumøguleikar, brúkaranavn o.t. Hetta verður sent í sambandi við, at nýggj útgáva av Netmiðluni er tikin í nýtslu. Netmiðlan lættir um hjá tí einstaka við at savna tilfar sum t.d. lønarseðlar á einum pappírleysum staði. Eisini er Netmiðlan ein liður í at minka flutningskostnaðin hjá tí almenna og samstundis varða av umhvørvinum við at tálma nýtsluna av pappíri. Hvør einstakur hevur tó framvegis møguleikan at fáa lønarseðlarnar sendandi við vanligum posti. Um hann ynskir tað, kann hann verða strikaður úr skipanini. P/F Alnet Studio hevur ment Netmiðluna og hevur dagliga raksturin av skipanini um hendi. Nýggja útgávan av Netmiðluni er á www.netmidlan.fo

## Fjarðafestivalurin 2009 flytur til juni

Fjarðafestivalurin hevur nú endaliga avgjørt at flyta festivalin í 2009 frá seinasta vikuskifti í august til fyrsta vikuskifti í juni. Komandi ár verður Fjarðafestivalurin 5 – 7 juni. Hetta verður gjørt av ymiskum orsøkum. Ein teirra er, at tað er lættari at fáa tey stóru amerikansku nøvnini, sum um somu tíð eru í Europa í samband við aðrar festivalar. Og eisini plagar veðrið at verað gott ta tíðina. Fjarðafestivalurin hevur stórar ætlanir komandi ár og ætlar at borðreiða við tí allarbesta kristna tónleikinum og kemur at venda sær til eina breiða fjøld av áhoyrarum, siga fyrireikararnir í tíðindaskrivi.

# Poppdiddur til Klaksvíkar

*Føroysku hittini hjá nýggja gentubólkinum eru nú sett á skránna á SummarFestivalinum*



**Gentubólkurin Faroe 5, sum hittar við sanginum Bara 1 Spæl, fer at spæla á SummarFestivalinum í næsta mánaði**

**TÓNLEIKUR**
*Tíðindaskriv*

Føroyingar hava havt møguleikan at fylgja við, meðan nýggjur gentubólkur í ár varð settur saman. Upptøkuroyndir vóru til gentubólkin fyrr í ár, og nógvar evnaríkar føroyskar gentur hildu seg fram at. Fimm gentur vórðu valdar burtur úr rúgvuni, og tær gjørdust til bólkin Faroe 5.

Fyrsta tónleikaliga útspælið frá Faroe 5 hevur givið bólkinum gjøgnumbrotið, sum tað næstan ikki slapst undan, tá ið hugsað verður um, hvørjir menninar eru, ið stílað fyri. Kári Jacobsen og Eyðfinn Jensen hava áður arbeitt saman um tónleik, og tað hevur riggað stak væl.

Tað gjørdi tað eisini hesaferð, og sangurin Bara 1 spæl er blivin eitt søtt summarhitt í Føroyum.

Tær fimm poppdiddurnar hava havt onkra einstaka framførslu higartil, men á SummarFestivalinum fáa tær veruliga møguleikan at spæla fyri einari stórari áhoyrarafjøld, nú fólk eisini kenna teirra tónleik.

Tær fimm í Faroe 5 eru Jónvá Ellingsgaard, Lillian Dalsgaard, Asta Højgaard, Ragnhild Dam og Vígdis Fjallstein.


# Hevur tú eitt miðlafólk í búkinum?

Starvslýsing: Journalistur til Miðlahúsið




Samtakið kring Miðlahúsið fevnir um Sosialin og Miðlavarpið, ið rekur Rás2. Í samtakinum starvast í dag 42 fólk.

Kom og hjálp okkum at menna Rás2, Sosialin og Portalin. Í Miðlahúsinum í Vágsbotni vilja vit støðugt styrkja okkum til avbjóðingarnar í einum livandi fjølmiðlaheimi.

Síðani oktober í fjør hevur Rás2 verið partur av okkara samtaki, sum er í støðugari menning. Nú sóknast vit eftir fólki at styrkja um tíðinda- og aktualitets partin á redaktiónini, fyrst og fremst á Rás2.

Sum partur av Miðlahúsinum fær tú møguleikan at virka í einum livandi og dynamiskum fjølmiðlaumhvørvi, har vit í felag royna at gagnnýta styrkir og møguleikar hjá okkara miðlum. So hevur tú hug til tíðindaheimin? Nøs fyri eini góðari søgu? Hevur tú hug og evni, bæði at arbeiða sjálvstøðugt og tætt saman við øðrum. Og dámar tær avbjóðingar? So lat okkum frætta frá tær!

Útbúgving og/ella royndir innan fjølmiðlaøkið eru absolutt fyrimunir, men tó ikki treytir.

Tú byrjar í starvi hjá okkum skjótast tilber, men helst ikki seinni enn 1. august.

Tú frættir meira um starvið við at seta teg í samband við Jan Müller, stjóra, á telefon 341800. Eisini ber til at senda teldubræv til jan@sosialurin.fo

Merkið brævbjálvan »umsókn« og sendið hesa í seinasta lagi 15. juli til:

**P/F Miðlavarpið**
**Postsmoga 76**
**FO-110 Tórshavn**

Sosialurin
miðlahúsið í Vágsbotni